

www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 01 - 2013

# Faroe Petroleum skorar hat trick í Norra

Føroyska oljufelagið Faroe Petroleum hevur gjørt eitt rimmar hál tað hevur av álvara skorað stórt í seinasta leitiumfarinum á norska landgrunninum, ja ein kann við røttum siga, at felagið hevur skorað hat trick, nú tað hevur fingið leiklutin sum fyristøðufelag í trimum av teimum átta loyvunum tað hevur fingið tillutað. Av 40 altjóða oljufeløgum liggur Faroe Petroleum millum tey fimm bestu. Gott hál Ì Noregi hava tey tvey sløg av útbjóðingum. Ein útbjóðing í nýggjum og ókendum økjum, sum lat aftur fyrst í desember í fjør. Og so ta sokallaðu APA útbjóðingina, hvørs úrslit varð kunngjørt týsdagin. Her er talan harafturímóti um leiting í longu kendum oljuøkjum á landgrunninum. Og tað er hesa seinastu, har Faroe Petroleum hevur gjørt eitt sera gott hál, so mikið gott, at heimsins største oljublað Upstream hevur føroyska felagið ovast á breddanum við yvirskriftini Small fry land big catch in Norway APA round. Blaðið skrivar, at lítla oljufelagið Faroe Petroleum hevur gjørt eitt rimmar hál í Norra. 51 loyvi eru latin til teir 40 umsøkjararnar. Blaðið skrivar, at tað eru meðalstór oljufeløg minnows, sum eru stóru vinnararnir av útbjóðingini. Her ikki minst norska Spring Energy við 13 loyvum og fyristøðufelag fyri fýra av teimum og so Faroe Petroleum við 8 loyvum harav sum fyristøðufelag fyri trý av loyvunum. Fíggjarlig styrki og góð úrslit Sum skilst eru norsku myndugleikarnir farnir at leggja stóran dent á fíggjarligu styrkina og hvussu væl tað hevur eyndast feløguum at gera fund á øðrum loyvum, tá teir gera av, hvørji feløg fáa flest loyvi. Og eitt felag sum Faroe Petroleum hevur havt eydnuna við sær í boringum á norska landgrunninum longu, hóast felagið er rættiliga nýtt í Noregi. Eisini hevur felagið megnað at skapa sær álit í bankaheiminum, soleiðis at tað í dag er fíggjarliga sterkt. Orsøkin til stóru undirtøkuna fyri útbjóðingini eru góðu oljuprísirnir og tey stóru fundini, sum eru gjørd í longu kendum oljuframleiðandi økjum á

landgrunninum. Statoil topskorari Statoil var eisini eitt av feløgunum, sum fekk lut í nógvum loyvum, tilsamans 14 harav 8 sum fyrististøðufelag. Statoil, sum var við til at finna Johan Sverdrup risakelduna í 2011, heldur, at nógv meira olja finst í økjum, har leitið er áður, men har man rætt og slætt ikki hevur leitað nógv væl og á rætta stað. Norski oljuráðharrin Ola Borton Moe sigur, at úrslitið av útbjóðingini vísir, at norski landgrunnurin framvegis er sera kappingarførur við onnur leitiøki í heiminum. Flestu av nýggju loyvunum eru latin í Norðsjónum, síðani í Norskahavinum og tey fægstu í Barentshavinum. Feløg, sum hava fingið loyvi sum fyriststøðufeløg, eru 23 í tali, og av teimum liggur Faroe Petroleum á einum býttum fjórða plássi - A/S Norske Shell (4) Bayerngas Norge AS (1) BG Norge AS (1) Bridge Energy AS (1) Centrica Resources Norge AS (3) Det norske oljeselskap ASA (3) DONG E&P Norge AS (2) E.ON E&P Norge AS (2) ENI Norge AS (1) Faroe Petroleum Norge AS (3) Lundin Norway AS (2) Maersk Oil Norway AS (1) Marathon Petroleum Norge AS (1) Norwegian Energy Company ASA (1) OMV Norge AS (1) Repsol Exploration Norge (1) RWE Dea Norge AS (1) Spring Energy Norway AS (4) Statoil Petroleum AS (7) Talisman Energy Norge AS (2) Total E&P Norge AS (4) VNG Norge AS (2) Wintershall Norge ASA (3) Og her er listin yvir feløgini og talið av loyvum. Av 40 feløgunum liggur Faroe Petroleum nr. 4. Agora Oil & Gas AS (2) A/S Norske Shell (5) Bayerngas Norge AS (7) BG Norge AS (2) Bridge Energy AS (1) Centrica Resources (Norge) AS (9) Chevron Norge AS (1) Concedo ASA (2) ConocoPhillips Skandinavia AS (1) Core Energy AS (1) Det norske oljeselskap ASA (8) Dong E&P Norge AS (5) E.ON E&P Norge AS (3) Edison International Norway Branch (2) ENI Norge AS (3) Explora Petroleum AS (3) ExxonMobil Exploration & Production Norway AS (4) Faroe Petroleum Norge AS (8) Fortis Petroleum Norge AS (5) GDF SUEZ E&P Norge AS (4) Idemitsu Petroleum Norge AS (1) Lundin Norway AS (7) Maersk Oil Norway AS (2) Marathon Petroleum Norge AS (2) Norwegian Energy Company ASA (2) North Energy ASA (1) OMV Norge AS (1) Petrolia Norway AS (1) Premier Oil Norge AS (1) Repsol Exploration Norge AS (1) RWE Dea Norge AS (2) Skagen44 AS (2) Spring Energy Norway AS (13) Statoil Petroleum AS (14) Svenska Petroleum Exploration AS (2) Talisman Energy Norge AS (3) Total E&P Norge AS (8) Valiant Petroleum Norge AS (2) VNG Norge AS (4) Wintershall Norge ASA (3) Mynd Góða úrslitið í útbjóðingini í Norra kemur bert stutt eftir, at Faroe Petroleum fekk tillutað leitiloyvi í Islandi. Her stjórin í Faroe Petroleum, Graham Stewart saman við íslendska forsetanum og stjóranum í Iceland Petroleum stutt undan loyvishandanini í Reykjavík.